# Pipar og útstoyt í Kollafirði

Grettir Hammer í Kollafirði vaknaði við kaldan dreym henda morgunin,



*Metstóra silo'in røkkur einar 8 metrar upp í luftina. Á teir tveir diametrarar hava vinmenn Grettirs skrivað persónligar heilsanir til føðingardagsbarnið*

hann var vorðin 30 ár.

Uttan at hann hevði varnast tað, høvdu nakrir av vinmonnum hansara prýtt bygdina við fráboðanum um, at Kollafjørður hevði »fostrað« enn ein piparsvein.

Kring bygdina høvdu teir nevniliga sett upp í hópatali av tunnum, har boðað varð frá hesi hending, og á tí eini atløgubryggjuni stóð ein átta metrar høg silo til heiður fyri føðingardagsbarnið.

Vinirnir høvdu so avgjørt verið í tí kreativa lagnum, tí umframt hesa metstóru silo og allar tunnurnar, høvdu teir eisini gjørt eina standmynd og eitt heiðursportur við og úr ymiskum gomlum billutum, so sum útstoytum, bremsiskivum, hjólskálum og líknandi.

Tað fréttist, at Grettir helst hevði væntað at okkurt fór at henda, nú hann gjørdist piparsveinur. Hann hevði tí roynt at eygleiða virksemið hjá vinmonnum sínum dagarnar undan og tíðliga hesa náttina. Men seint á nátt, eftir at Grettir var farin til songar, hava vinmenninir so kortini verið til arbeiðis, hóast teir allir sum ein siga seg hava sovið alla náttina á tamb!

Leygardagin hittust teir aftur til at eta restir frá føðingardegnum – ein grýturætt við kópakjøti. Men vanlukkutíð – einki pipar var í húsinum. Har var tí ikki annað at gera enn at senda Grettir Piparsvein í býin eftir pipari.

Løtu seinni var hann aftur, og so kundu tey enn einaferð fara til borðs.




*Vinmenninir høvdu verið í kreativa lagnum, og høvdu ognað Grettiri (á myndini) eitt heiðursportur úr gomlum billutum*

# Syngjandi tvíburar við andaligari fløgu

**Árni og Marner Andreasen eru uttan iva best kendir sum ímyndin av bólkunum Black Birds og Juliannu Boys. Í dag geva teir út fløgu við andaligum tónleiki**

FLØGA

Hesir bólkar eru kendir sum dansibólkar, umboðandi tann meira versliga tónleikin. Árni og Marnar hava eisini útgivið fløgur og bond, ið hava selt sera væl.

Nú kemur so teirra fyrsta fløga við andaligum sangum, og so kann ein – ikki uttan orsøk – spyrja hví. Svarið er at finna á matarseðlinum inni í fløguhúsanum.

– Upprunaliga var ætlanin við fløguni bert at geva familju og kenningum andaliga føði í tí dagliga. Men eftirspurningurin eftir hesi fløguni varð so stórur, at vit avgjørdu snøgt sagt bara at geva hana út, siga teir báðir.

Allur peningurin, ið kemur inn frá søluni, fer óskerdur til Frelsunarherin, við ynski um at stuðla teimum í tí andaliga og sosiala arbeiðinum, ið tey borga fyri.

– Sjálvir hava vit báðir slitið okkara barnaskógvar í Frelsunarherinum, og fingið okkara tónlistagávur har. Við hesi útgávuni vóna vit, at vit kunnu bera nakað til ta samkomu, ið ríkaði okkara mongu ógloymandi barnadagar í miðbýnum í Havn.



*Teir báðir kendu tvíburarnir – Árni og Marner Andreassen – geva nú út fløgu við andaligum sangum*

### Trettan sangir

Á fløguni eru trettan sangir, flest allir eru kendir, – í hvussu so er millum »Frelsensher« fjepparar og onnur við.

Tvíburarnir hava latið sangirnar í sín sermerkta búna, har tað fólksliga og røddirnar eru tað berandi.

Á fløguni eru fleiri sangir, ið kunnu gerast tær reinu landaplágur. Hvat við »Nærri mín Guð til tín« í sermerktari takt, »Tá basunin skal ljóða« ella »So langt eg kann minnast« í góðum vanabundnun føroyskum stíli.

Her osar av einum »bestseljara«, men sambært tvíburunum Árna og Marnar Andreasen, so er ein avmarkað nøgd til keyps.

Tað er Árni, ið hevur staðið fyri upptøkunum og hann spælir øll ljóðførini. Marnar er hann, ið stendur tættast mikrofonini og syngur fyri.

Fløgan, ið kemur á marknaðin í dag, er framleidd í Hoyvík hjá sp/f Garasjan, og er innspæld í »TwinStudio« í Havn í desember 2004.